# fara til Margrethu drotning



*Áðrenn Ove fór úr Føroyum, vildi hann heilsa upp á ommu sína, Suffíu, sum tá var elligomul. Ove hevði nógvar góðar eginleikar – og ikki minst var hann familjukærur*



*Lagið er gott, nú drúgva ferðin er lokin, og byrðan at rógva millum lond ikki longur liggur á hansara herðum. Her tosar Ove við mammu sína, Olevinu*





*Ove heilsar fólki, sum eru komin saman á Kongabrúnni, nú leiðin ber út aftur til Nólsoyar eftir drúgvu ferðina, sum eisini byrjaði í Nólsoy*



*Jákup A. Arge hittir Ova á Ráðhúsplássinum í Keypmannahavn. Ove rættir postsekkin út ígjøgnum vindeygað á bilinum. Saman fara teir at leita eftir einum posthúsi*

syfti – gamaní. Postmaðurin fór síðan afturum við sekkinum.

Tað tók eina góða løtu, til maðurin kom aftur.

- Tá ið postmaðurin kom aftur, hevði pípan fingið annað ljóð. Postmaðurin segði nú, at hann hevði tosað við Postverk Føroya. Boðini úr Føroyum vóru, at teir ikki skuldu lata hann fáa postsekkin, sum hann hevði havt við sær á ferðini úr Føroyum, aftur, sigur Jákup.

Men hetta vildi Ove als ikki góðtaka – og so slett ikki, heldur.

"Hvis jeg ikke får min postsæk tilbage, går jeg direkte til dronning Margrethe og fortæller hende, hvordan jeg er blevet behandlet her. Vi kender hinanden godt...", legði hann aftrat.

Jákup A. Arge sigur, at fyri honum sá tað út, sum um donsku postmenninir, sum vóru til steðar, gjørdust rættiligta órógvaðir. Nú drálaðu teir ikki, men góvu Ova postsekkin aftur í stundini.

- Eg ivist onga løtu í, at Ove Joensen hevði farið til Margrethu drotning, um tað gjørdist neyðugt fyri at fáa postsekkin aftur. Sekkin, sum hann hevði havt við um hav – við óstemplaðum brøvum, vildi hann hava aftur, sigur Jákup A. Arge.

Hetta er ein søga, sum fá hava hoyrt um Ova, og vit hildu, at nú 20 ár eru liðin, síðan hann framdi bragdið at rógva úr Nólsoy til Danmarkar, var hóskandi at bera hana fram fyri almenningin.